almannastovan
www.almannastovan.fo

## SÁLARFRØÐINGAR
TIL ALMANNASTOVUNA / FAMILJUHÚSIÐ

Søkt verður eftir 2 sálarfrøðingum til Almannastovuna/Familjuhúsið at byrja 1. september 2008 ella skjótast til ber. Størvini eru fulltíðarstørv, men møguleiki er eisini fyri at arbeiða niðursetta tíð. Arbeiðsøkið umfatar alt stovnsøkið, men í løtuni er arbeiðsøkið Familjuhúsið.

UM FAMILJUHÚSIÐ
Familjuhúsið er ein fyriskipan undir Almannastovuni, og heldur til í húsum í Sandagerði.

Í húsinum eru fleiri eindir:
- familjuráðgeving
- dagviðgerðareind
- eygleiðingar- og útgreiningareind
- bráðfeingisbúpláss

UM STARVIÐ
Familjuráðgevingin veitir ráðgeving, vegleiðing og viðgerð til børn og ung við umfatandi førleikatarni og familjur teirra.

Dagviðgerðareindin veitir í samstarvi við Mentamálaráðið undirvísing og námsfrøðiliga viðgerð til børn og ung við víðfevndum sálarligum trupulleikum, ið ikki rúmast í fólkaskúlanum.

Fyri at betra um visitatiónina inn á stovnsøkið, og fyri at menna stovnsøkið til at kunna nøkta fjølbroytta tørvin á stovnstilboðum, eru ætlanir at stovna eina eygleiðingar- og útgreiningareind.

Fyri at tryggja børnunum búpláss, meðan útgreiningin fer fram, er ætlanin at útvega bráðfeingis búpláss.

FØRLEIKAKRØV
Vit sóknast eftir 2 fólkum við útbúgvingunum cand. psyk. ella cand. pæd. psyk.

SETANARVIÐURSKIFTI
Løn og setanarviðurskifti verða smb. sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Petru Johnsdóttir Joensen, stjóra.

UMSÓKNARFREIST
Skrivlig umsókn saman við prógvi o.ø. skal vera Almannastovuni í hendi í seinasta lagi mánadagin 25.08.08, kl. 12.

UMSÓKN SENDAST TIL
Almannastovan, Smyrilsvegur 20
Postboks 3096, 110 Tórshavn.

Viðmerkjast: Sálarfrøðingur til Almannastovuna.

KREA

**Mentamálaráðið**
Fólkaskúladeildin

Endurlýsing

# Einalærari í Fámjins Skúla

**Tíðaravmarkað starv sum einalærari í Fámjins skúla verður lýst leyst til setanar skúlaárið 2008/09.
Í Fámjins skúla eru 3 næmingar í 1. – 5. flokki.**

**Um starvið**
Einalærarin er bæði leiðari og lærari skúlans og hevur sjálvur meginpartin av undirvísingini í skúlanum.

**Søkt verður eftir einalærara, sum**
- undir ábyrgd skúlamyndugleikanna skal hava fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluna og ábyrgd av virksemi skúlans
- skal fremja góðar arbeiðsumstøður og gott samstarv millum skúla og heim
- skal vera førur fyri at loysa trupulleikar
- í samstarvi við foreldrini skal virka fyri, at næmingarnir fáa sum mest burtur úr skúlagongdini bæði fakliga og sosialt.

**Førleikakrøv:**
Umsøkjari skal hava fólkaskúlalæraraút búgving og starvsroyndir í fólkaskúlanum. Harumframt er tað ein fyrimunur, um umsøkjarar hava leiðsluroyndir.

**Lønar- og setanartreytir:**
Setanarøkið er undir Mentamálaráðnum við tænastu í Fámjins skúla.

Starvið er flokkað í lønarflokkunum 27.1, 28.1, 29.1, 29.2 og 31.2 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.

Umsókn saman við prógvi, C.V. o.ø. skal verða Mentamálaráðnum í hendi í seinasta lagi 29. august 2008 kl. 12.00.

Tey, ið ynskja fleiri upplýsingar um starvið, kunnu ringja til Jenny Lydersen, undirvísingarleiðara, tlf. 355050.

Mentamálaráðið hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harumframt eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.




## Stríðist tú við vektina?

**BMI-eftirlit 14. hvønn dag á Oyrabakka, Argjum, í Leirvík og í Froðba**

- Mánadag 25. aug. kl.19.00 í Norðskála-Oyra skúla.
- Týsdag 26. aug. kl.19.00 Áarrás 8, á Argjum
- Mikudag 27. aug. kl.19.00 í Skótahúsinum í Leirvík
- Mikudag 3. sept. kl.19.00 hjá Jennie í Froðba

**Tilmelding:**
Jana: tlf. 517100 Eileen: tlf. 507733
Edith: tlf. 510566 Jennie: tlf. 278202



www.lr.fo






## Hanix H15B til sølu

**Tlf. 215800**







# Volvo S40 til sølu
*– økonomiskur luksusbilur*

Sera væl hildin ikki-roykjara bilur. 1.8 bensin við 125 hk. Árg. 10/2005, koyrt 30.000 km. Hevur ljósagrá leðursetur, leður róður, leður gearknobb v/alu, alu-panelir, el-spegl, orig. 17" alu-felgur, niðurbl. bakkspegl v/kumpass, klimaanlegg, innbygd barnasetur aftan o.m.a. Er sum nýggjur bæði innan og uttan. Hevur bert havt 1 eigara.

**Verður nú seldur fyri rímiligan prís**

**Tel 21 19 96 ella kho@post.olivant.fo**